FÁ EITT ÓGLOYMANDI UPPIHALD
Á HOTEL NORÐ Á VIÐAREIÐI

Hotel Norð liggur mitt í vakra umhvørvinum á Viðareiði. Hotellið hevur 15 dupultkamur við wc og bað, við møguleika fyri eyka uppreiðing.

Hotellið hevur egnan køk, og egnan kokk og kvaliteturin er í topp. T.d. kunnu vit beint nú bjóða nýveiddan føroyskan lunda á hugnaligu matstovu okkara, soleiðis sum einans Hotel Norð kann gera hann til.

Gjøgnum árið skipað vit fyri nógvum ymiskum tiltøkum á hotellinum t.d. kunnu nevnast haruveitsla, lundakvøld, tiltøk fyri eldri, tiltøk fyri bindiklubbar, buffetkvøld við undirhaldi og tónleiki, tað tiltikna heystkvøldið við góðum dansi, umframt onnur tiltøk.

Longu nú er Hotellið farið undir at fyrireika teir sera væl umtóktu jólafrokostarnar, ið ætlanin er at hava 20. og 27. novbember og 11. desember.

Hotellið er sera væl egna til brúdleyp og veitslur. Pláss er fyri 275 gestum í matarsalinum. Eisini hava vit smærri rúm, har upp til 30 fólk kunnu sita.

Hotellið er eisini væl egna til ymisk skeið, t.d. hava vit eitt væl útgjørt skeiðshøli, har upp til 30 fólk kunnu sita, umframt onnur høli, sum kunnu nýtast til júst tygara endamál.

Opið er frá 1. juni til 1. september, men uttan fyri nevnda tíðarskeið er opið eftir bíleggjing.

Fá meira at vita við at vitja heimasíðu okkara á www.hotelnord.fo.

**Seti tykkum í samband við okkum á tlf. +298 451244 ella +298 217020 ella send ein teldupost til teldubústaðin: hotel@hotelnord.fo**
**Vit veita fegin tilboð.**

Hotel Norð
TEL 45 12 44 · FAX 45 12 45 · FO-750 VIÐAREIÐI





Fáið meira burturúr
við okkara fiskiútgerð

Línuspøl, egnitraktir o.o. útgerð
TrawlTec til trolarar
TrawlTec til línubátar
Íslendskar snellur - bæði 12 og 24 volt

Fa. Jóannes F. Dahl, Maskinsmiður,
Tlf: +298 422 274, Fax: +298 422 189, Mobil: +298 221 000,
dam-dahl@post.olivant.fo, 460 Norðskála, Føroyar

Umboð fyri VAKI DNG



D6-310 DP OKKARA MEST EFFEKTIVI
DIESEL MOTORUR NAKRANTÍÐ






Tann nýggi D6-310. Við 6 sylindarum, 310 hestum, elektroniskt stýrdum "common rail" brennoljuinnspræning, og tí nýggja DP drevinum, fært tú sigliførleikar, sum yvirganga allar aðrar diesel motorar við Z-drevi.

Brennoljunýtslan og útstoytsútlatið er merkiligani lágt. D6 er 5.5 litur, men við ísetanarmálum á einum 4 liturs motori,
er tað nú møguligt at íseta meiri kraft í sama pláss.

Setur nýtt støði fyri diesel styrki...

les tíðindini á www.volvopenta.com

VOLVO PENTA

Bátatænastan P/F
Gríms Kambansgøta 4 · Postsmoga 101
FO-110 Tórshavn · Tel 311735 · Fax 313835



ØLLUM VIÐSKIFTAFÓLKI OKKARA YNSKJA VIT EINA GÓÐA ÓLAVSØKU





8
... tú fært tað munandi betri hjá
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi · Tórshavn · Tel. 31 49 49 · Fax 31 13 30






*– Her eru nógvir kjøt- og fiskarættir eins og í øðrum matstovum, men teir verða tilgjørdir á ein annan hátt enn aðrastaðni, greiðir Mohsen Darvishi frá. Matarkortið er ein gomul familjuuppskrift*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Alt frá Grappa til Tiramisù

**Í matstovuni Toscana í Havn er ein veruligur italskur dámur. Italski køkurin verður settur í hásætið mitt í miðbýnum**



*Lágt er til loftið, og mestsum mitt í øllum meldrinum sær ein beint niðan í køkin, har kokkurin er í holt við at fyrireika eina máltíð. Toscana er nýggjasta skotið á stammuni í matstovuheiminum í høvuðsstaðnum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*


MATSTOVA
*Ingrid Bjarnstein*
*ingrid@sosialurin.fo*


»When the moon hits your eye like a big pizza pie. That´s amore...« Vælkendu orðini í sanginum hjá Dean Martin glíða spakuliga út gjøgnum hátalararnar. Lágt er til loftið, og mestsum mitt í øllum meldrinum sær ein beint niðan í køkin, har kokkurin er í holt við at fyrireika eina máltíð. Ljósini eru dempað, og málningar hjá heimskendum italienskum málarum prýða veggirnar.

– Eg havi innrættað matstovuna soleiðis, at hon líkist teimum lítlu matstovunum, sum ein millum annað kann finna uppi í fjøllunum nær við Siena í Toscana, sigur Mohsen Darvishi, sum eigur og rekur matstovuna Toscana, sum er uppkallað eftir eini región í Norðuritalia.

Hann hevur sjálvur búð í Italia í fleiri ár, har hann hevur starvast á italienskum matstovum. Mohsen hevur sjálvur rikið eina italienska matstovu í Bjerringbro, áðrenn hann flutti til Føroya.

## Familjuuppskrift

Mohsen Darvishi er sjálvur kokkur. Matarskráin er fyri tað mesta italiensk við nógvum serrættum.

– Her eru nógvir kjøt- og fiskarættir eins og í øðrum matstovum, men teir verða tilgjørdir á ein annan hátt enn aðrastaðni, greiðir Mohsen frá.

Matarkortið er ein gomul familjuuppskrift frá eini matstovu, sum Mohsen arbeiddi á í Italia.

Á vínkortinum er bara italskt vín, sum Mohsen sjálvur innflytur til Føroya úr Italia. Hann fær sendandi smakkiroyndir av víni, og um honum dámar tað, og tað hóskar seg til matin, so bíleggur hann eina sending.

– Eg vil heldur bíleggja sjálvur og vera vísur í, hvat eg fái enn at keypa okkurt uppi í Rúsdrekkasøluni, sigur hann.

Umframt italskan mat og vín eru eisini aðrir italskir serrættir at fáa í Toscana. Nevnast kunnu millum annað italski snapsurin Grappa og eyðkenda dessertin Tiramisú (hála meg upp).

## Fleirfaldað rusk á ólavsøku


RUDDING
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*


Havnargøtur eru ikki tespiligar eftir ólavsøku. Ballónir, íløt, brotnar fløskur og rusk yvirhøvur liggur og flýtur eftir vegum og gøtum. Men hvønn morgun er alt ruddað vekk aftur.

Ein vanligan gerandisdag er talan um 0,5 rúmmetrar, sum ruskmenninir savnað saman av havnargøtum. Farið verður í gongd klokkan sjey á morgni og hildið verður áfram sjey-átta tímar.

### Ólavsøkan toppar

Sambært Jørmundi Olsen, næstformanni í Reinhaldinum, veksur ruskmongdin nógv á ólavsøku.

– Um vikuskiftini kunnu vit koma upp á eini tveir rúmmetrar, men á ólavsøku savna vit saman 20 rúmmetrar eftir einum degi, sigur Jørmund Olsen.

## Óli P í Smiðjuni á ólavsøku



Eins og undanfarnu árini verða tekningarnar hjá Óla P í Sosialinum aftur at síggja í Smiðjuni í Lítluvík á ólavsøku. Opið er frá týsdegi 27. juli til sunnukvøld 1. august, allar dagar frá klokkan 14 til 20, tó 27. juli frá klokkan 15.

## Friðarbogin í Grasagarði

Ólavsøkuaftan skipar Friðarbogin fyri tiltøkum í Grasagarði. Har verða konsert og café.

Tiltakið byrjar klokkan 18.

## Útisjónleikur byrjar á Busatanga

Í sambandi við ólavsøkuna er eins og undanfarin ár settur ein útisjónleikur uppá beinini. Byrjað verður á Busatanga, og hildið verður fram ígjøgnum býin: Vaglið, Steinatún, Tróndargøta, Bøgøta, Skálatrøð og Vágsbotnur – Liðugt verður umleið klokkan 16.30.